Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	5. des. 2024
Mál nr.:	23/20058-6
Málsviðgjørt:	Terji Beder
Ummælistíð:	4 vikur
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Kunngerð um broyting í kunngerð um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, sum broytt við kunngerð nr. 108 frá 25. juni 2021

§ 1

Í kunngerð nr. 97 frá 17. juni 2021 um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftaná § 16 verður sett:

"Samstarvsráð

§ 16 a. Rektarin kann eftir tørvi seta samstarvsráð fyri hvørja einstaka útbúgving ella útbúgvingarøki, tó § 16 a. stk. 5.

Stk 2. Endamálið við samstarvsráðnum er at fremja samstarv millum teir partar, ið varða av útbúgvingini ella útbúgvingarøkinum og av viðkomandi starvsøki sum heild.

Stk. 3. Samstarvsráðini verða sett umboðandi viðkomandi áhugapartar, við atliti at javnstøðu.

Stk. 4. Rektarin skipar fyri nærri innanhýsis starvsskipan fyri samstarvsráðini.

Stk. 5. Samstarvsráð fyri sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina, námsfrøðiútbúgvingina og fólkaskúlalæraraútbúgvingina verða sett sambært ásetingunum í teimum serstøku kunngerðunum, sum galda fyri útbúgvingarnar."

§ 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen